


**_Nr. 21_** **_11. oktober 2020_** **_80. árg._**

# Hin dýrabara tíðin

*Anne Christiansen*

Gud hevur givið okkum tíðina. Tímar, dagar, mánaðir og ár. Á Bíbliunnar fyrsta blaði lesa vit, at Harrin setti tey bæði ljósini, sólina og mánan, á himmalhválvið, at lýsa niður á jørðina og skilja dag frá nátt. Í einum av Sálmunum biður Móses: „At telja várar dagar tú okkum læri, at vit mega vísdóm í hjartanum fáa!“ Sálm. 90,12. Tíðin er eitt av tí dýrabarasta, vit hava. Tað at duga at umsita tíðina er høgt í metum. Eitt ár er farið, vit hava lagt eitt tíggjuáraskeið aftur um bak. Vit eru í 2020 og eru byrjað upp á eitt nýtt tíggjuáraskeið. Guds profetiska klokka dikkar. Hvat man hetta tíggjuáraskeiðið fara at rúma? Hvussu fer okkara verð at síggja út 2030?

Guds Orð eggjar okkum ikki bara til at steðga á og telja várar dagar. Harrin vil, at vit skulu skilja tíðirnar. Bíblian dregur fram synir Issakars, tí teir dugdu at skyna á tíðunum. 1. Krýn. 12,32.

Sum trúgvandi eru vit kallað at skilja tíðirnar, so at vit vita, hvussu vit skulu liva í teimum. Tíðirnar broytast við rúkandi ferð, og mong ting eru í broyting og menning, og tí er tað krevjandi at fylgja við, sjálvt hjá tí, sum av sonnum vil tað, men mitt í øllum hesum óstøðuga er okkurt, sum stendur klettafast: Gud vil, at hvørt einasta menniskja skal verða frelst og trúgva gleðiboðskapinum, at hann gav sín egna Son, Jesus Kristus, fyri at eingin skal síggja glatanina, men at øll skulu vinna ævigt lív.

Við hesum sjónarmiði skilja vit, at dagarnir skulu teljast! Okkum er tørvur á vísdómi og innliti, so at vit kunnu brúka

ta dýrabaru tíðina rætt. Hvat hevur av sonnum týdning? Uttan mun til, hvat yrki ella arbeiði, í hvørjum skúla ella hvørja lestrarleið vit hava gingið, uttan mun til hvørjum stigi í lívinum vit eru í, so er tað nakað, sum er felags fyri okkum øll: Vit bera evangeliið við okkum allastaðni, har vit eru. Latið okkum síggja til, at tíðin, vit liva í, verður merkt av tí, sum av sonnum hevur týdning.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vel uppskriftina hjá Paulusi og Silasi

Paulus og Silas sótu í fongsli í Filippi. Teir kundu havt valt at verið óðir við Gud, ella kjakast um, hvør ið hevði skyldina í hesi vanlukkuligu støðuni, teir vóru í, ella teir kundu havt grenjað og sitið har í vantrúgv og tunglyndi. Og illimaður, hann hevði verið glaður fyri øll hesi ymsu valini, sum eru nevnd omanfyri.

Men teir valdu eina aðra leið. Teir hildu bøn og sungu Gudi lovsangir. Hetta gleddi Gud so nógv, at Hann kom við buldri og braki inn á leikpallin: „Tá kom knappliga ein stórur landskjálvti, so at grundvøllurin í fangahúsinum ristist, og alt fyri eitt opnaðust allar dyr, og leinkjurnar fullu av øllum.“ Áps. 16,26.

Nátt broyttist til dag, myrkur til ljós, vónloysi til vón!

Latið tað vera okkara bøn, at vit búnast og fáa tað sinnalagið, sum velur uppskriftina hjá Paulusi og Silasi, tá ið vit eru í einum órímiligum myrkri. So fara vit eisini at uppliva Gud koma inn á leikpallin og gera tað óvæntaða.

*Effie Campbell* umsetti.

# END or BEND?

Eg vil luta eina lítla frásøgn við tær, sum vit kunnu kalla eitt líknilsi. Ein genta úr Filipsoyggjunum sendi mær hana. Jú meir eg hugsi um hana, jú glaðari eri eg vorðin. Kanska hon eisini fer at gleða teg.

Eg skrivi nakrar setningar á enskum, av tí at tvey orð ríma, og tað styrkir um kjarnan í søguni. Men eg skal týða frásøgnina. Hon er stutt og ljóðar soleiðis á enskum:

I looked down the road of life and thought: „Oh no, that’s the END!“ But God said: „Relax my child! What you see is not the END, but just a BEND!“

Á føroyskum ljóðar hon soleiðis: Eg hugdi oman eftir lívsins landavegi og hugsaði: „Á nei, eg eri komin til ENDAN á vegnum!“ Men Gud segði: „Sissa teg, mítt barn! Tað, sum tú sært har frammi, er ikki ENDIN, men bara ein vegbugur!“

Vit menniskju eru ofta andaliga stuttskygd og síggja ikki skilliga, hvat ið liggur fyri framman. Eg havi ofta hildið, at eg var komin til endan á vegnum, og eg havi grundað yvir, um eg nú eisini havi nátt tað, Gud væntaði av mær. Men hvørja ferð gjørdist tað greitt, at tað var ikki ENDIN, men bara ein vegbugur. Hetta var ikki endin á vegnum og lívinum, men bara eitt krapt sving – og lívið helt fram. Kanska kanst tú kenna teg aftur í hesum líknilsinum.

Mong dømi eru úr dagliga degnum, úr heimssøguni og úr Skriftini, at tað, menniskju trúðu, var endin, var bara eitt sving.

Hvat við Dánjali og teimum trimum vinmonnum hansara, Sjádraki, Mesjaki og Abed-Nego í Dánjals Bók í 3. og 6. kapitli? Tveir máttmiklir kongar í Bábel ætlaðu at gera enda á hesum monnum, av tí at teir sýttu fyri at boyggja seg fyri øðrum enn Ábrahams, Ísaks og Jákups Gudi. Fyrst var tað Nebukadnezar, sum blakaði teir tríggjar vinmenn Dánjals í ein ovurhitaðan ovn. So var tað Dárius kongur, sum blakaði Dánjal fyri ein flokk av hungurstungnum leyvum. Men tá ið endin ikki er komin hjá Gudi, er tað eingin, sum kann beina fyri Guds tænarum fyri tíðina. Sjádrak, Mesjak og Ábed-Nego sluppu óskalaðir út úr tí gløðandi ovninum, av tí at Jesus kom og var saman við teimum. Klæðini hjá teimum vóru óskadd, og teir luktaðu ikki av royki. Eisini Dánjal varð bjargaður, av tí at Gud sendi ein eingil, sum múlabant leyvurnar.

So hetta gjørdist ikki endin hjá teimum fýra hebrearunum, men eitt sving til framhaldandi tænastu í Bábel. Men hetta gjørdist endin á hugmóðinum og vantrúnni hjá bæði Nebukadnezari og Dáriusi. Tí teir sóu hin livandi Gud vísa sína makt. So Dárius skrivaði til øll í ríki sínum: „Nú gevi eg tað boð, at í øllum veldi ríkis míns skulu menn ræðast og óttast gud Dánjals. Tí hann er hin livandi Gud og verður ævinliga til; ríki hans man aldri farast, á veldi hans verður eingin endi.“ (Dán. 6,27).

Vit kundu hildið áfram at funnið dømir um tað, sum menniskju hildu vera endan, men tað var bara eitt sving. Slíkir

vitnisburðir finna vit bæði á bløðunum í Bíbliuni og í egna lívi okkara. Soleiðis er Gud. Hann loyvir hvørki menniskjum ella demonum at enda okkara lív. Tað er Gud, sum kallar okkum til okkara himmalska heim og bjóðar okkum vælkomnum við einum: „Vælkomin heim, tú góði og trúgvi tænari!"

Hin mest avgerandi frásøgnin, har tað, sum líktist endanum, gjørdist eitt sving, var Golgata. Har helt Satan, at hann hevði sett son Guds skák og mát og gjørt enda á honum, so alt var uttan mál og meining. Har hekk hann á krossinum, píndur, sligin og særdur, meðan tey, ið gingu framvið, spýttu á hann. Áðrenn Jesus doyði, fekk hann kortini tíð at rópa: „Tað er fullgjørt!"

Men man Satan ikki hava tulkað tað sum eitt ørligt, vónleyst og ráðaleyst róp – og síðani kom jarðarferðin við tí forseglaða steininum og rómversku vaktarmonnunum við grøvina. Jú, Satan helt vist, at hetta var tann vesaligi endin á Jesu missión her á jørð.

So skelkurin hevur verið ómetaligur, tá ið Satan páskamorgun var varur við, at hetta var ikki endin, men bara eitt sving, sum ruddaði slóð til eina beinleiðis atgongd gjøgnum Perluportrið fyri øll, sum ákalla Harran Jesus.

Æra veri Gud og Lambið, at Hann lutar henda Golgatasigurin við okkum smáu menniskju, so vit eisini sleppa at ganga ígjøgnum Perluportrið og heim til tann bústaðin, sum Jesus hevur tilbúgvið hvørjum einstøkum okkara.

*Moses Hansen*
*Effie Campbell* umsetti.

---

Nicky Cruz: Djevulin gerst meir og meir djarvur og ósmæðin á okkara døgum. Men Gud vil vera ein eldmúrur kring okkum, sum hava sett okkara álit á Hann.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 11. okt. | Tekstur: | 1 Mós. 25,24–34; 27,5–17 + 30–36 + 42–43 | bíbliuorð: | 2 Mós 20,15 |
| 18. okt. | Tekstur: | 1 Mós. 28,10–22 | bíbliuorð: | 5 Mós. 4,39 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 22*** ***25. oktober 2020*** ***80. árg.***

# MEN GUD…!

Tvey týdningarmikil orð, sum vit ongantíð mugu gloyma. Uttan mun til, hvussu torført fólk høvdu tað, so komu tey víðari, av tí at tey í trúgv søgdu: „MEN GUD…!“ og tey litu á Hann.

**Bønarinnar týdningur:**
MEN GUD hevði hoyrt bøn Ábrahams, og Hann bjargaði Lot frá tí vanlukkuni, sum legði býirnar í dalinum í oyði. 1. Mós. 19,29. – „MEN GUD er hjálpari mín, Harrin er tann, ið heldur lívi mínum uppi!“ Sálm. 54,6 V.D.

**Tá ið fíggindarnir hótta:**
MEN GUD hóttir at teimum, og tey flýggja langt burtur. Tey fúka sum dumba á fjøllum fyri vindinum, sum dustskýggj fyri storminum.“ Jes. 17,13 V.D. – „MEN GUD skal hjálpa mær! Tí verði eg ikki til skammar; tí havi eg gjørt andlit mítt hart sum stein, og eg veit, at eg ikki skal standa vónbrotin.“ Jes. 50,7 V.D.

**Mitt í Paulusar mongu forfylgingum:**
MEN GUD hevur hjálpt mær aftur og aftur, tá ið eg havi boðað orðið fyri smáum og stórum. Áps. 6,22. – „MEN GUD sýnir kærleika sín til okkara av tí, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar.“ Róm. 5,8. – „MEN GUD svaraði: „Eg leivdi mær sjálvum 7.000 menn, sum ikki hava boygt knæ fyri Báal.“ Róm. 11,4. – „MEN GUD, sum troystar hini niðurboygdu, hann troystaði okkum við komu Titusar.“

2. Kor. 7,6 – „MEN GUD, sum er ríkur í miskunn, hevur av sínum mikla kærleika, sum Hann elskaði okkum við, eisini tá ið vit vóru deyðir í misgerðum okkara, gjørt okkum livandi saman við Kristi – av náði eru tit frelstir!“ Ef. 2,4–5.

Jósef svaraði Farao: „Tað stendur ikki til mín – MEN GUD skal geva eitt svar, sum spáar Farao eydnu!“ 1. Mós. 41,16 V.D.

Guds skaparverk sigur alt um hansara stórleika, vakurleika og makt. Tann Skaparin er Faðir okkara. So uttan mun til, hvat ið møtir okkum, kunnu vit siga: „MEN FAÐIR MÍN KANN!“

*Effie Campbell* umsetti.

# Biður tú fyri onkrum, sum ikki er frelstur?

*„… hann er langmóðigur við tykkum, av tí at hann ikki vil, at nakar skal glatast…“ 2. Pæt. 3,9.*

Um tú biður fyri einum nærskyldum persóni, sum ikki er frelstur, so fært tú her eitt bíbilskt lyfti, sum tú kanst standa á í dag: „ … hann er langmóðigur við tykkum, av tí at hann ikki vil, at nakar skal glatast, men at øll skulu koma til umvendingar.“

Strika orðið „tykkum“ og set navnið á tínum skyldfólki staðin fyri. So leingi, sum lív er, er vón! Síðsta undurverkið, Jesus gjørdi, var at frelsa ein brotsmann, sum hekk á einum krossi undir liðini á honum: „Í dag skalt tú vera við mær í páradís!“ Luk. 23,43.

Skaldið, Annie Johnson Flint, orðar tað so:

*Guds náði er botnleys,*
*ómáldur hans friður.*
*Og aldri hans megi*
*kann svinna avstað.*
*Og av sínum veldigu*
*ævigu skattum*
*Hann gevur og gevur*
*og gevur hvønn dag.*

Uttan mun til hvussu „langt úti“ tíni kæru kanska eru, kann Guds náði og miskunnsemi enn røkka teimum – so halt á at biðja fyri teimum. Hoyr: „Hond Harrans er ikki ov stutt til at frelsa, oyra hans ikki so deyvt, at tað ikki hoyrir.“ Jes. 59,1.

Jesus segði: „Eingin kann koma til mín, uttan faðirin, sum sendi meg, dregur hann.“ Jóhs. 6,44. Bið tí Gud senda onkran til tíni kæru, sum vil vísa teimum, hvussu tú verður frelstur. Fram um alt mást tú ikki falla í fátt og byrja at ivast. Minst til, at tað er Guds vilji at frelsa tey, og tá ið tú veitst, at tú biður í samsvari við vilja hansara, kanst tú nærkast honum við frímóði. „Og hetta er tað treystið, sum vit hava til hansara, at um vit biðja um okkurt eftir vilja hansara, tá hoyrir hann okkum. Og um vit vita, at hann hoyrir okkum, hvat vit so biðja um, tá vita vit, at okkum eru veittar tær bønir, sum vit hava biðið hann um.“ 1. Jóh. 15,14–15.

*„… et Ord til Dagen“ Effie Campbell* umsetti.

# Hví tilbiðja ein Gud, sum eg ikki síggi?

*„Í hjarta dárar siga: „Ei nakar Gud er til.“ Sálm. 14,1*

Ein maður, sum undirskrivar seg „ateistur“, spyr úti á netinum: „Hví skal eg tilbiðja ein Gud sum eg ikki síggi?“

Men eg spyrji gudloysingin: „Hví goymir tú teg fyri einum koronavirusi, sum tú ikki sært?“

Veruleikin er, at alt tað, sum vit síggja henda í tí **sjónligu** verðini, er ein avleiðing av tilburðum í tí ósjónligu verðini.

Eg síggi ikki elektrisitet; men eg síggi avleiðingarnar av tí.

Eg síggi ikki vindin; men eg síggi avleiðingarnar av honum.

Eg síggi ikki virus; men eg síggi fylgjurnar av tí.

Eg síggi ikki Gud; men eg síggi skaparverk hansara, og lív mítt bleiv púra broytt, tá ið eg tók við trúnni á tann ósjónliga Jesus. Sjónliga lívið hjá allari mínari familju er úrslitið, sum stendst av náðini, virkinum, fyrigevingini, kærleikanum, inntrivinum og signingunum hjá tí ósjónliga Gudi.

Hví goyma ateistarnir seg fyri einum virus, sum teir ikki síggja?

Í tí ósjónligu verðini eru Satan og illu andarnir eisini. Eg vissi teg um, at teir eru ikki ateistar. Ják. 2,19 sigur, at illu andarnir trúgva á tann eina sanna Gud – og teir skelva av ótta fyri dómadegi. Teir vita, hvat ið bíðar teimum fyri framman.

Einaferð vóru teir uppi hjá Gudi – Gud skapti teir. Men Satan gjørdi uppreistur og vildi vera Gudi líkur. So bleiv

hann blakaður út – og saman við honum uml.triðingurin av einglunum. (Opb. 12,3 og 7–9).

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvat arbeiðir Gud við?

Gud sendi son sín til hesa verð, tí hann skuldi gjalda prísin fyri syndina. Tann prísurin var deyðin.

Jesus fullførdi tað arbeiðið við ósigandi pínu – men eisini við ómetaligari gleði. Tá ið hin krossfesti Guds sonur rópti: „Tað er fullgjørt!“ – var ein vegur ruddaður aftur til Guds fyri øll menniskju.

Hvat arbeiðir Gud við? **At øll menniskju skulu frelsast**. Men meginparturin hevur lítla virðing fyri Jesusi. Vit halda, at alt tað góða, vit hava í gerandisdegnum, hava vit sjálv framleitt – og taka æruna fyri tað. Hvussu mong munnu takka Gudi fyri dagliga breyðið, fyri heilsu, fyri evni og at sleppa at liva undir tryggum korum?

Hvussu nógv skulu vit missa? Hvussu nógv skulu vit verða pressað? Hvussu nógv skulu vit verða roynd, áðrenn vit sanna, at vit hava brúk fyri Jesusi???

Er ein korona-pandemi nóg mikið, áðrenn vit boyggja okkara knø fyri Jesusi Kristi og takka honum fyri ta undurfullu frelsu, hann hevur vunnið okkum?

Vit biðja um veking, um eitt gott heyst, um skarar, ið verða frelstir, áðrenn Jesus kemur aftur.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit liva í einari tíð, har tað er møguligt at síggja Jesus koma aftur eftir sínum. Ongantíð hevur tað verið møguligt at vinna verðina á ein slíkan hátt og so skjótt sum í okkara tøknifrøðiligu tíð. Tíðin er nú, og hon er okkara. Vit eru sendiboð Harrans, og uppgávan er okkara.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25. okt. | Tekstur: 1. Mós. 29, 1–30; 31,2–3; 33,1-11 | bíbliuorð: 1. Mós 31,3 |
| 1. nov. | Tekstur: Opb. 7,13–17; 21,1–5 | bíbliuorð: Áps. 2,21 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74